## Nebo verður tikið í nýtslu



Í morgin, leygardagin 13. desember, verður nýggi bygningurin hjá samkomuni Nebo á Toftum tikin í nýtslu. Innbjóðingar eru sendar øllum húskjunum í Nes kommunu. Húsið verður opið frá kl. 14 og kl. 15 verður samkoma, har umboð fyri samkomuna, bygdarráðið og fíggingarstovnin fara at siga nøkur orð. Har verður eisini felagssangur og onkrar sangframførslur. Eftir at møguleiki aftur hevur verið at síggja húsið, verður jólasangløta kl. 17.

## Skúlavígsla í Runavík

Í sambandi við, at skúlin í Runavík er tikin í nýtslu, verður skipað fyri almennum hátíðarhaldi í nýggja skúlanum leygardagin klokkan 14. Á skránni verða kórsangur og røður, og næmingar úr skúlanum fara at framføra tónleik, fólkadans, føroyskan dans og sýna fram næmingaarbeiði. Skúlin í Runavík hýsir næmingum úr 4.–10. flokk, sum allir eru tvísporaðir. 1.–3. flokkarnir eru í skúlanum á Glyvrum. Nú skúlin í Runavík er tikin í nýtslu, eru skúlarnir í Rituvík og Søldarfirði niðurlagdir og verða brúktir til ávikavist barnaansing og handilsskúla.

# Loysir seg ikki at loysa



*Við bryggjukantin á Toftum í morgun lógu Vesturhavið, Thomas Nygaard og Randi. Fyrrnevndu landaðu fyrr í hesi vikuni. Mánadagin koma fleiri skip inn at landa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í seinastuni hevur gingið illa hjá skipum og bátum at fáa tann minstaprís fyri fiskin, sum tey áseta. Miðskeiðis í vikuni fór útróðrarhýsa heilt niður í 3-4 krónur fyri kilo, og hetta hevur gjørt, at menn tíma ikki at loysa bátarnar. Eisini hjá línuskipunum kann hýsa standa upp í dagar á marknaðinum, áðrenn hon verður seld – fyri lítið og lætt**

FISKAMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Er tað nakar, sum hevur góðar fyritreytir fyri at fylgja gongdini, tá ræður um útboð og eftirspurning eftir fiski, eru tað tey, sum arbeiða á Fiskamarknaði Føroya og á Landingarmiðstøðini á Toftum.

Sosialurin var ein túr framvið bryggjukantinum á Toftum í morgun.

### Eingin útróður

Støðan á fiskamarknaðinum hevur verið vánalig seinastu dagarnar. Nokso fitt av fiski hevur verið á marknaðinum, men trupult hevur verið at selt. Sum skilst, er tað serliga hýsan, sum hevur staðið eftir og er farin fyri lítið og lætt, tá eingin keypari var til tann minstaprís, sum skip og bátar høvdu ásett.

Eitt dømi um, hvussu trupul fiskamarknaðurin er í løtuni, er, at teir, sum eiga útróðrarbátarnar, halda ikki, at tað nyttar nakað at loysa.

Miðskeiðis í hesi vikuni fór hýsa hjá onkrum útróðrarbáti fyri 3-4 krónur fyri kilo, áðrenn nakar keypari meldaði seg.

Hetta er daggamal og væl hagreiddur fiskur, so sigast kann ikki, at áhugin – ella møguleikarnir – hjá keyparum eru stórir.

Miðskeiðis í vikuni kom eisini línuskipið Mascot inn at landa, og enn í morgun, tá vit frættu, stóðu eini 6.000 pund av hýsuni framvegis eftir, óseld.

Ætlanin var at royna at selja henda fiskin aftur í morgun.

### Fleiri skip

Í morgun selja tvey línuskip, Morgunstjørnan og Eysturoyingur, á fiskamarknaðinum, men ivasamt er, hvat tey fara at fáa fyri fiskin.

Morgunstjørnan og Eysturoyingur landa mándagin, og tað fara línuskipini Sigmundur og Kambur eisini.

Sum skilst, eru tvey onnur línuskip, Eystnes og Váðasteinur, eisini líðug við túrin mánadagin, men tey ætla sær av landinum við veiðini.

Ivasamt er tó, hvat hetta fer at geva í søluvirði.

Men, sum onkur hevur sagt – at skalt tú sigla, mást tú loysa...

Nú marknaðurin fyri hýsu hevur verið sera vánaligur í vikuni, hevur fiskasølufelagið Fo-Fish í Saltangará keypt nakað av fiski, sum er seldur víðari til Høvdavirkið í Leirvík til turkingar.



*Farmaskipið Silver Fjord, sum siglir við feskum fiski av Toftum til Scrabster í Skotlandi, lastar í dag og í kvøld. Hetta er í minsta lagi ein "ventilur", sum ger mun, nú fiskamarknaðurin er so strongdur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Fyrr í vikuni seldu línuskipini Vesturhavið og Thomas Nygaard á Toftum, og heldur ikki hjá teimum var sølan nakað at "skriva" heim um.

### Orsøkin

Ein orsøk til, at so fáir keyparar eru í Føroyum, er ivaleyst, at Norðís Seafood á Eiði meira ella minni liggur stilt, eins og virkið hjá Faroe Seafood í Miðvági, læt aftur í summar. Hesi bæði virkini keyptu og virkaðu hýsu. Haraftrat kemur, at heldur einki virksemi av týdningi er á Kósini í Klaksvík.

Heimurin er í fíggjarkreppu, og tað er føroyska samfelagið eisini. Tann, sum ikki hevur likviditet at arbeiða við, man hava smáar møguleikar, soleiðis sum støðan er.

Nøkur virki liggja inni við stórum goymslum, sum binda nógvan pening, og herfyri skiltist, at eitt av hesum virkjum er Fiskavirkið í Gøtu – og eitt annað er Vaðhorn á Strondum.

Hinvegin hevur Sosialurin skilt, at saltfiskavirkið hjá Faroe Seafood á Toftum ikki liggur inni við teimum stórum goymslum í løtuni.

Tað er tó einki, sum bendir á, at viðurskiftini hjá Fiskavirkinum í Gøtu og Vaðhorn á Strondum eru hótt, tí vit hava skilt, at bæði hesi virkini keypa væl av fiski á marknaðinum í løtuni.

# Tað sær veruliga dapurt út

**- Eg væntí ikki, at tað fer at lýsa í aftur, fyrr enn vit eru komin langt inn í ár 2009, sigur Harry Benjaminsen, sum starvast hjá Landingarmiðstøð Føroya og er formaður í Tofta Arbeiðarafelag**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvønn dag í sínum dagliga yrki sum arbeiðsmaður á Landingarmiðstøðini á Toftum hevur hann høvi at fylgja gongdini í høvuðsvinnuni – okkara fiski-og framleiðsluvinnu.

Sjálvandi veit hann ikki út í æsir, hvat virkini gera, og hvussu gongdin hjá teimum er, men hann veit, um tey keypa fisk, hvørji fiskasløg tey keypa, og hvat tey geva fyri fiskin.

Við øðrum orðum veit Harry, hvussu samanhangurin er millum útboð og eftirspurning – og hvat tað merkir, tá útboðið verður størri enn eftirspurningurin.

### Døpur støða

Formaðurin í Tofta Arbeiðarafelag er onga løtu í iva um, at tað vinnuliga sær ikki so lovandi út í samfelagnum í løtuni.

- Nei, eg haldi avgjørt, at vit síggja keðilig tekin. Tað gongur illa at selja fisk, tí áhugin at keypa er avmarkaður – og viðhvørt rættiliga lítil.

Harry heldur, at tað er fíggjarkreppan kring um heimin og likviditetskreppan úti og heima, sum eru atvoldin til trupulleikarnar.

- Eg stúri fyri, at tað fer at ganga niður á bakka. Kanska fara vit at síggja glottar inn ímillum, men eg beri ótta fyri, at vit fara at koma langt inn í ár 2009, áðrenn vit fara at síggja nakrar veruligar batar, sigur formaðurin í Tofta Arbeiðarafelag.



*- Vit fara kanska at síggja onkrar glottar av og á, men eg stúri fyri, at tað fer at ganga niður á bakka í eina tíð, sigur Harry Benjaminsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*